– trygt og ómakaleyst til hús

# Dámlig hús á Glyvrum

INNI



Húsini standa væl fyri í náturuvøkrum umhvørvi og hava sera gott útsýni.









## Umhvørvið

Tú koyrir av høvuðsvegnum og niðan til til húsini, ið standa í náttúruvøkrum, veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum øki við frálíkum útsýni yvir vøkru Runavíkina allan Skálafjørðin. Fyrst kemur tú til eina stóra og góða garagu, so bilurin stendur væl vardur í øllum veðri. Síðan fert tú inn í snøgga og hugnaliga urtagarðin við runnum og blómum. Her er alt væl hildið, eins og húsini og alt uttanum er tað. Omanfyri húsini er tún og eystureftir er útigólv / altanur – alt í alt eitt hugnaligt umhvørvi, har tú njóta útilívið. Eisini er stutt til handlar, dagstovn, skúla, sparkivøll og bussamband.

## Uttan og innan

Stóru og góðu húsini eru dagførd og væl viðlíkahildin um enn okkurt er, sum treingir til ábøtur, men grundleggjandi er talan um eini væl bygd og væl hildin hús, ið væl kunnu vera karmur um lívið hjá familjuni, ið ynskir nógv pláss, ella hjá teimum, sum vilja lætta sær um útreiðslurnar við at leiga út. Húsini eru dámlig innan og í góðum standi, so tú so at siga kanst flyta beint inn. Haraftrurat eru møguleikar at gera broytingar eftir tørvi, tí alt er væl smíðað við góðum tilfari. Stóru vindeyguni geva nógv ljós inn og eitt sera gott útsýni út. Tú hevur tí eitt sera gott samband við umhvørvi og kennir teg á ongan hátt innilæstan, men kann tó væl og virðiliga vera ósæddur inni hjá tær sjálvum.

## Innan

Í ovaru hædder, hjallur, inngongd, gong / trappugong, køkur, goymslurúm, stova, hjúnarúm, kamar og baðirúm. Í niðaru hædd er inngongd, gong / trappugong, 2 kømur, baðirúm við brúsu, stórt kjallararúm, vaskirúm, fýrrúm og eitt óinnrættað rúm. Lætt er at gera sjálvstøðuga íbúð. Góð trappa er millum hæddirnar.

## Fakta

Addressa: ...........Leitisgøta 7, Glyvrar
Byggiár: .............1968
Hæddir:...............2
Gólvvídd:.............210 $m^2$
Grundøki:............620 $m^2$
Hjallur: ................Ja
Bilhús:.................Ja
Prísuppskot: ......kr. 1.200.000











PF INNI
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**